LEMVIGH-MÜLLER

# Móttøka

Tann 1. januar 2011 hevði
Christian P. Christiensen, deildarleiðari,
**25 ára starvsdag.**

Í tí sambandi verður móttøka
**fríggjadagin 7. februar 2011 frá kl. 15-17**
á hesi adressu:

**Lemvigh-Müller**
**R.C. Effersøesgøta 10**
**FO-100 Tórshavn**

*Vit gleða okkum at hitta kundar, veitarar og vinir*

# Fyrsta barn og fyrsti føroyingur

**Nýggjárskvøld føddi Finngerð Jensen úr Kvívík sítt fyrsta barn, og drongurin var eisini fyrst fødda barn í nýggja árinum**

Randi Jacobsen

Klokkan 18.23 nýggjárskvøld kom fyrsta barnið í Føroyum.

Barnið var ein 56 cm langur drongur, sum vigaði 4050 gramm.

Mamman er Finngerð Jensen úr Kvívík og pápin Rúni Patursson úr Kirkjubø.

Finngerð Jensen var ikki so bilsin av, at hon føddi fyrsta barnið, sum kom i verðina í ár.

– Eg fekk tíð at koma á Landssjúkrahúsið nýggjársdag fyri at verða sett í gongd, sigur Finngerð Jensen.

Drongurin er hennara fyrsta barn.

Mamman veit ikki, nær hon kann fara heim av sjúkrahúsinum. Fyrr sluppu mammur við nýføðingum at vera á føðideildini í fimm dagar. Nú eru reglurnar so, at mamma og barn kunnu vera á sjúkrahúsinum, til tey eru klár at fara heim. Tað vil siga, tá ið barnið dugir at súgva og trívist.

Ein genta er aftrat komin i verðina í ár.



*Finngerð Jensen við sínum fyrsta føddi barni, sum eisini var ársins fyrsta fødda barn í landinum*

Mynd: Jens Kristian Vang

# Trúgvur tænari heiðraður

**Ívar Iversen varð gamlaárskvøld heiðraður við "fortjenstmedalju" úr silvuri frá Margrethu drotning fyri sítt trúfesti sum urguspælari**

Randi Jacobsen

Klokkan 17 gamlarskvøld var gudstænasta í Kvívíkar kirkju.

Á loftinum sat Ívar Iversen við urguna, sum hann hevur gjørt óteljandi ferðir, síðan hann var 13-14 ára gamal.

Tá ið Theodor E. D. Olsen preestur hevði hildið sína prædiku, kom Ívar Iversen niður av loftinum, og Jógvan Fríðriksson, bispur handaði honum fortjenstmedaljuna úr silvuri frá Margrethu drotning. Bispur handaði medaljuna vegna drotningina.

Hetta var ein hátíðarlig løta. Heilt fitt av fólki var í kirkju, og skótar vóru eisini við.

Ívar Iversen byrjaði so smátt at hjálpa til, longu tá ið hann var trettan ára gamal, og síðan hevur hann spælt í Kvívíkar Kirkju, Kaldbaks kirkju, í Vesturkirkjuni, á Lágargarði og á Hvíldarheiminum.

## Trúgvur og drúgvur tænari

– Hann hevur verið trúfastur, ágrýtin og nærlagdur í tænastuni, men hevur ongantíð gjørt nakað hóvasták burtur úr sær sjálvum, sigur Jógvan Fríðriksson.

Hann nevnir eisini, hvussu beinasamur Ívar Iversen altíð hevur verið. Tá ið presti hevur borist frá at møtt til gudstænastu á onkrum stovni, hevur Ívar Iversen sjálvur lisið lestur.

– Aftrat øllum hesum hevur hann sungið fyri lívi í yvir 40 ár, sigur Jógvan Fríðriksson.

Tá ið Ívar Iversen varð kallaður niður av loftinum gamlaárskvøld at fáa medaljuna, spældi hann ikki meira í kirkjuni tann dagin. Ein annar tók yvir.

Men longu dagin eftir, sat 80 ára gamli Ívar Iversen aftur við urguna, og tá ið Kaldbaks kirkju, veit Jógvan Fríðriksson.



*Jógvan Fríðriksson handaði Ívari Iversen medaljuna, eftir at Theodor E. D. Olsen, prestur hevði prædikað*

Mynd: Jens Kristian Vang